Føroya Keypssamtøka

## LEYST STARV

## Varaleiðari til handilin í Dr. Jakobsensgøtu

At seta skjótast til ber ella eftir eftir nærri avtalu.

**Uppgávurnar eru:**
- **at** halda handilin á einum høgum støði
- **at** hava dagligu ábyrgdina av einum nøktandi handli hjá viðskiftafólkunum
- **at** vera avloysari hjá deildarleiðaranum

**Eisini er møguleiki fyri:**
- framtíðaravbjóðingum
- at royna evnir og hugflog í einum spennandi umhvørvi

Løn sambært avtalu.

Áhugað kunnu venda sær til Bo Møller Hansen, deildarleiðara, tlf. 281721.

Skrivlig umsókn skal sendast til **FK Dr. Jakobsensgøtu, boks 349, 110 Tórshavn**, att. Bo M. Hansen í seinasta lagi 16. august 2000.

**Keypssamtøkan**
**í Dr. Jakobsensgøtu**

Føroya Keypssamtøka

## Fólk søkist til grønmetisdeildina

at byrja 1. september ella eftir nærri avtalu.

**Vit vænta av tær**
- **at** tú hevur hollan kunnleika til frukt og grønmeti frá núverandi ella fyrrverandi arbeiði
- **at** tú hevur eyga fyri dygd og búskapi
- **at** tú ert kreativur og virkin, og kann vísa fram eina fyrstafloks deild, sum er tann besta í býnum

**Vit kunnu bjóða tær**
- **eitt** sjálvstøðugt og mennandi arbeiði
- **eitt** gott arbeiðsumhvørvi

Áhugað kunnu venda sær til Bo Møller Hansen, deildarleiðara, tlf. 281721.

Skrivlig umsókn skal sendast til **FK Dr. Jakobsensgøtu, boks 349, 110 Tórshavn**, att. Bo M. Hansen í seinasta lagi 16. august 2000.

**Keypssamtøkan**
**í Dr. Jakobsensgøtu**

## Undirvísingar- og mentamálstýrið
### Mentamáladeildin

## ENDURLÝSING
## Deildarleiðarar
### til Sjúkrasystraskúla Føroya

Vegna ov fáar umsóknir verður við hesum lýst av nýggjum eftir deildarleiðara til sjúkrasystraútbúgvingina og deildarleiðara til almanna- og heilsuútbúgvingarnar.

Sjúkrasystraskúli Føroya fer, umframt at fevna um sjúkrasystraútbúgvingina, eisini at fevna um tær nýggju almanna- og heilsuútbúgvingarnar. Sjúkrasystraskúli Føroya fer sostatt at hava tvær útbúgvingarrásir, og fer hvør rásin sær at hava ein deildarleiðara við fakligari og námsfrøðiligari ábyrgd.

### Deildarleiðari fyri sjúkrasystraútbúgvingina

**Høvuðsuppgávur**
- Vararektari tá rektarin er burturstaddur/burturstødd
- Gerð av útbúgvingarætlan
- Fyrisiting og ábyrgd av útbúgvingini
- Planleggja og gera tímatalvu, evnisarbeiði o.l.
- Viðgera mál viðvíkjandi lesandi
- Menningaruppgávur
- Undirvísa uml. helvtina av arbeiðstíðini

**Vit sóknast eftir einum persóni, ið**
- er sjúkrasystur við viðkomandi framhaldsútbúgving ella eftirútbúgving
- hevur vitan um og royndir innan útbúgvingarviðurskifti innan heilsuøkið
- hevur royndir innan námsfrøði og leiðslu til at røkja ta dagligu fakligu og námsfrøðiligu leiðsluna av sjúkrasystraútbúgvingini
- skal kunna samstarva við hinar leiðararnar, til at skapa eitt mennandi og skapandi umhvørvi fyri lesandi, lærarar og starvsfólk

**Setanar- og lønartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Sjúkrasystrafelag Føroya.

### Deildarleiðari fyri almanna- og heilsuútbúgvingarnar

**Høvuðsuppgávur**
- Gerð av útbúgvingarætlan
- Fyrisiting og ábyrgd av útbúgvingunum
- Planleggja og gera tímatalvu, evnisarbeiði o.l.
- Viðgera mál viðvíkjandi næmingum
- Menningaruppgávur
- Undirvísa uml. helvtina av arbeiðstíðini

**Vit sóknast eftir einum persóni, ið**
- hevur framhaldsútbúgving, ið kann metast at vera viðkomandi fyri almanna- og heilsuútbúgvingarnar
- hevur vitan um og royndir innan útbúgvingarviðurskifti innan heilsuøkið og gjarna innan miðnámsútbúgvingar
- hevur royndir innan námsfrøði og leiðslu til at røkja ta dagligu fakligu og námsfrøðiligu leiðsluna av almanna- og heilsuútbúgvingunum
- skal kunna samstarva við hinar leiðararnar, til at skapa eitt mennandi og skapandi umhvørvi fyri næmingar, lærarar og starvsfólk

**Setanar- og lønartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag.

**Vit bjóða**
Tvey størv við avbjóðing, har tú verður við til at skapa sjálvt starvið, eins væl og ta víðari menningina í skúlanum.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum o.ø verður at senda til:
Undirvísingar- og Mentamálastýrið
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn
Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi **21.08.2000**, kl. 15.00.
Størvini verða at seta skjótast tilber.

Um tygum ynskja fleiri upplýsingar, herundir eina starvslýsing, kunna tygum ringja til Jóannes Dalsgaard, deildarstjóra, á tlf. 215052 ella Kristionnu S. Jacobsen, fulltrúa, á tlf. 314545 (privat) ella tlf. 355050 eftir 14.08.2000.

***Undirvísingar- og Mentamálastýrið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og ymiskum frítíðarvirksemi.*
***Sjúkrasystraskúli Føroya** verður útbygdur til eisini at umfata tær nýggju almanna- og heilsuútbúgvingarnar, og fer sostatt at hava tvær útbúgvingarrásir. Onnur rásin er sjúkrasystraútbúgvingin, ið er ein miðallong framhaldsútbúgving, 45 mðr., og hin rásin fevnir um tær nýggju almanna- og heilsuútbúgvingarnar. Hesar umfata almanna- og heilsuhjálparaútbúgvingina, 1 ár, og almanna- og heilsurøktaraútbúgvingina, 1½ ár. Í løtuni eru um 9 størv á Sjúkrasystraskúla Føroya, og økist hetta nakað, tá tann nýggja skipanin er farin at virka.*

www.sosialurin.fo



## Undirvísingar- og mentamálstýrið
### Mentamáladeildin

## ENDURLÝSING
## Rektari
### til Sjúkrasystraskúla Føroya

Vegna ov fáar umsóknir verður við hesum lýst av nýggjum eftir rektara til Sjúkrasystraskúla Føroya.

Sjúkrasystraskúli Føroya fer, umframt at fevna um sjúkrasystraútbúgvingina, eisini at fevna um tær nýggju almanna- og heilsuútbúgvingarnar. Sjúkrasystraskúli Føroya fer sostatt at hava tvær útbúgvingarrásir, og fer hvør rásin sær at hava ein deildarleiðara við fakligari og námsfrøðiligari ábyrgd.

***Starvið***
Rektarin umboðar skúlan úteftir og hevur undir Undirvísingar- og Mentamálastýrinum evstu ábyrgd av, at útbúgvingarnar verða framdar sambært galdandi lógum og reglum.

Afturat skúlanum verður knýttur skrivari, ið er rektaranum til hjálpar við fyrisitingaruppgávum.

Rektarin hevur eina ávísa undirvísingarskyldu.

***Førleikakrøv***
- Sjúkrasystraútbúgving við viðkomandi framhaldsútbúgving ella eftirútbúgving
- Royndir innan leiðslu, undirvísing og annað námsfrøðiligt virksemi
- Góð leiðslu- og samstarvsevni
- Skil fyri fíggjarstýring og fyrisitingarligum viðurskiftum

Tað er av týdningi, at rektarin er før/ur fyri at leiða og fyrisita báðar útbúgvingarrásirnar, og kann virka í góðum samstarvi við starvsfelagar.

Rektarin skal kunna savna, samskipa og hava yvirlit. Rektarin skal vera menningarsinnað/ur og kunna fáa í lag eitt álitisfult og mennandi samstarv bæði innan- og uttanhýsis.

***Vit bjóða***
Eitt starv við avbjóðing, har tú verður við til at skapa sjálvt starvið, eins væl og ta víðari menningina á skúlanum.

***Setanar- og lønartreytir***
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Sjúkrasystrafelag Føroya.

***Umsókn***
Umsókn við prógvum o.ø verður at senda til:

Undirvísingar- og Mentamálastýrið
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi **14.08.2000**, kl. 15.00.

Starvið verður at seta skjótast tilber.

Rektarin verður við til at seta bæði deildarleiðarastørvini.

Um tygum ynskja fleiri upplýsingar, herundir eina starvslýsing, kunna tygum ringja til Jóannes Dalsgaard, deildarstjóra, á tlf. 215052 ella Kristionnu S. Jacobsen, fulltrúa, á tlf. 314545 (privat).

***Undirvísingar- og Mentamálastýrið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.*
***Sjúkrasystraskúli Føroya** hevur tvær útbúgvingarrásir, har onnur rásin er sjúkrasystraútbúgvingin og hin tær nýggju almanna- og heilsuútbúgvingarnar. Sjúkrasystraútbúgvingin er ein miðallong framhaldsútbúgving á 45 mðr.. Almanna- og heilsuútbúgvingarnar umfata almanna- og heilsuhjálparaútbúgvingina, 1 ár, og almanna- og heilsurøktaraútbúgvingina, 1½ ár. Í løtuni eru um 9 størv á Sjúkrasystraskúla Føroya, og økist hetta nakað, tá tann nýggja skipanin er farin at virka.*

Almanna- og Heilsumálastýrið

## Ergoterapeutur/ Fysioterapeutur
### til
## Hjálpartólamiðstøðina (HTM)

Á HTM er ½ tíðar starv sum Erogterapeutur/ Fysioterapeutur leyst at seta sum skjótast.

Arbeiðstíð í miðal 20 t. um vikuna.

HTM er deild av Almannastovuni og umsitur hjálpartól, umbyggingar í heiminum og avlamisbilar til fólk, ið bera brek.
9 fólk starvast á HTM.

**Uppgávurnar hjá HTM umfata m.a.:**
- upplýsing, ráðgeving og leiðbeining til brúkarar, almennar myndugleikar o.o. í hjálpartólum og byggi- og bústaðarspurningum,
- útlán og endurnýtsla av hjálpartólum
- viðgerð og støðutakan til umsóknir um sertillagað hjálpartól, bústaðarbroytingar og avlamisbilar.

**Vit sóknast eftir einum starvsfelaga sum hevur:**
- útbúgving sum ergoterapeutur / fysioterapeutur
- royndir frá líknandi arbeiði (ikki treyt)
- góð samstarvsevnir
- telduførleika

**Vit kunnu bjóða:**
- sjálvstøðugt arbeiði
- flextíð
- nýggja tøkni
- tætt samstarv við starvsfelagarnar
- samskifti við viðskiftafólk

Løn og setanartreytir sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og viðkomandi yrkisfelag.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Palla Mortensen leiðara á HTM tel. 318300.

Umsókn við avriti av relevantum prógvum skal sendast til Almanna- og Heilsumálastýrið, starvsfólkadeildin, Eirargarður 2, 100 Tórshavn

**Umsóknarfreist:** 5. september 2000 kl. 14.00.

## 66 Skúvoyarleiðin

Frá 1. august 2000 og til nærri verður lýst, siglir Sildberin eftir hesi ferðaætlan:

Siglingartíð: 35 min.

**Sandur**

| Kl. | Dagur | Tíðaravmarkingar o.a. |
|---|---|---|
| 07:15 | x | tilkalling |
| 09:00 | x | |
| 09:00 | 67 | tilkalling |
| 14:10 | 24 | farmaflutningur |
| 16:30 | x67 | tilkalling |
| 19:00 | 5 | tilkalling |

Tilkalling á tlf. 28 97 88

STRANDFARASKIP LANDSINS

Rutuupplýsingin, tlf. 343030 - Fax 343003
Heimasíða: www.ssl.fo

## FISKIMÁLASTÝRIÐ

## Vaskifólk til Fiskirannsóknarstovuna

Søkt verður eftir vaskifólki til Fiskirannsóknarstovuna at byrja 18. august. Arbeiðstíðin er 5 tímar um dagin. Skrivlig umsókn má vera okkum í hendi í **seinasta** lagi 14. august.

**Fiskirannsóknarstovan**
Nóatún, Postrúm 3051
FO-110 Tórshavn
Tlf. 315092, Fax 318264


**Trukkar, stáblarar og BT lyftivognar til tygara tørv!**



Sosialurin - 311820

Vit útvega EXIDE battaríir, løðitól til **øll merkir** av trukkum og stáblarum

Tosið við okkum!

**Kaj Andreasen & Co**
Sandvíkarhjalli - Tel. 315600 - Fax 318008

*Lýsið í* **sosialinum**